# Dimmalætting

**Mikudagur**
19. mai 1999
Nr. 91 • 122. árgangur
Tlf. 311212 • Fax 310941



**Adressur hjá Dimmalætting:**
Smyrilsvegur 13
Postboks 19, FO 110 Tórshavn
Heimasíða: www.dimma.fo
e-mail: redaktion@dimma.fo


## Ikki bert vegatarar í Australia

Higartil hava vísindafólk hildið, at forndjórini í Australia vóru friðarlig urtaatarar, men skølturin av einum 17 milliónir ára gomlum úlvi sigur nakað annað

LEIF LAADAL

Paleontologisturin (!?) Stephen Loroe heldur her varisliga skøltinum av einum 17 milliónir ára gomlum pungdjóra-úlvi. Beinagrindin av gamla úlvinum bleiv funnin við fjallið Isa í norðara parti av Queensland. Serfrøðingar á Lærda Háskulanum í New South Wales halda, at hetta slag av úlvi er beinleiðis í ætt við tasmanska tígaran, sum bleiv oyddur í 1936.

Higartil hevur Australia verið rópt »Passiva Utopia«, tá ið prátið hevur snúð seg um fornar tíðir og tey djór, sum livdu tá. Mett hevur verið, at bert urtaatarar livdu í Australia fyri milliónum av árum síðani, men nú úlvurin er funnin, mugu serfrøðingarnir aftur til at rokna og draga frá.





## Sleppa aftur at drepa hval

Amerikanska stjórnin hevur givið Makah indianarum loyvi at veiða gráhval aftur. Fyrsti hvalurin var skotin mánadagin og togaður inn til Neah víkina, har Makah indianararnir halda til

LEIF LAADAL

Fyri at hátíðarhalda, at Makah indianararnir hava fingið loyvi at veiða gráhval aftur, fóru menn í kanoinar við hondbornari harpun og riflu mánadagin. Átta árar og ein róðursmaður, og so varð hildið til havs. Hvalurin var funnin eitt sindur úti á, og tað eydnaðist manninum við harpununi at seta fast á hvalin. Hetta var tó ikki nóg mikið til at drepa hann, so ein annar indianari skeyt eftir hvalinum og rakti hann tríggjar ferðir við rifluni.

Umhvørvisfelagsskapir eru í øðini, nú Makah indianarar hava fingið loyvi at drepa gráhval aftur, eftir at teir ikki hava veitt hval síðani síðst í 20-árunum. Felagsskapinirnir megnaðu tó ikki at forða fyri, at fyrsti hvalurin bleiv dripin, tí skip hjá amerikonsku verjuni fylgdu kanoini allan vegin. Serfrøðingar hava sagt, at gráhvalurin ikki er í vanda longur, so mett verður, at tað einki skaðar, um Makah indianararnir drepa nakrar hvalir árliga.

## Størsti filmsfestivalur í Evropa

Nú er aftur filmsfestivalur í Cannes. Festivalurin er alla hesa vikuna, og sunnudagin verður besti filmur í ár valdur

LEIF LAADAL



Filmsfestivalurin í Cannes sigst vera nógv tann týdningarmiklasti festivalur av sínum slag í Evropa - ja, kanska í øllum heiminum. Framleiðarar og keyparar flokkast um hvønn annan, meðan ferðafólk royna at halda fast um stelkin á champagnu-glasinum.

Í ár kappast 22 filmar um tær gyltu pálmarnar, sum er fyrsta virðisløn á festivalinum. Í sambandi við frumsýningina av filminum »Felicia's Journey« høvdu fólk møguleika at síggja lørini hjá nøkrum av dansarunum úr kenda dansihúsinum »Moulin Rouge« í París. Tað er kanadiarin Atom Egoyan, sum hevur leikstjórnað hendan filmin, sum sigst hava góðan møguleika at vinna pálmarnar í ár.

## Kutaði í Picasso málning

Ein 41 ára gamal sálarliga sjúkur hollendingur gjørdi seg í vikuskiftinum inn á ein av málningunum hjá Picasso í Stedelijk savninum í Amsterdam

LEIF LAADAL

Tann 41 ára gamli bleiv handtikin stutt eftir at hann við knívi sínum hevði skorið eitt stórt hol í málningin hjá Picasso. Hann viðgekk beinanvegin, at tað var hann, sum hevði gjørt brotsgerðina.

Málningurin, ið eitur »Mujeres desnudas ante el jardin«, sum kundi verið umsett til »Nakin kvinna framman fyri garð«, er mettur at hava eitt virði millum fimm og sjey og eina hálva millión dollarar - umleið 40 milliónir krónur.

Hendingin í listasavninum í Amsterdam hevur aftur birt upp undir kjakið um trygdina á listasavnum í Hollandi. Serliga er tað trygdin í Stedelijk savninum, sum fólk hava tosað um, tí ein líknandi hending hendi fyri tveimum árum síðani, tá ið ein maður kutaði í ein málning av amerikanska ekspresionistinum Barnett Newman.

Stedelijk savnið er eitt av mest vitjaðu listasøvnunum í Hollandi.



## So stórir eru teir

Marknasáttmálin bleiv undirskrivaður í gjárkvøldið, so skuldi eingin forðing verið fyri, at ein føroysk oljuvinna kann fara av bakkastokki. Risa oljuskipið á myndini fór av bakkastokki fyri nøkrum árum síðani, og tað verður spennandi at vita, um eitt av hesum verður at síggja á Drelnesi ella á Skálafjørðinum innan alt ov langa tíð.

Litla frítíðarskútan frammanfyri sær ikki út av nógvum í mun til Palmstar Rose, sum er í ferð við at taka inn olju í Williamstown í Australia.




## Mick Jagger vil varðveita konuna

Fyri at varðveita konu sína Jery Hall er Mick Jagger ikki farin í kleystur, men til ein sálarfrøðing

LEIF LAADAL

Tað er so ómetaliga væl dámt at ganga til, ella kanska rættari, fara til sálarfrøðing í hesum døgum. Er kettan deyð ella hevur súkkluhjólið mist luftina, so er bara ein gongd leið: Far til sálarfrøðing!

Sambært enska tíðindablaðnum Daily Mail hevur Mick Jagger biðið konu sína koma við til sálarfrøðingin. Gamli »Rolling Stones« sangarin eigur fýra børn við Jerry Hall, men hann eigur eini eini tvey-trý við øðrum kvinnum. Hetta, við at Jagger ikki kann halda sær á máttuni, er størsti trupulleikin við hjúnabandinum, og sambært einum vinmanni hjá Jagger er ætlanin nú, at Mick Jagger skal siga Jerry Hall frá um allar tær ferðirnar, hann hevur verið ótrúgvur. Hvussu nógvar tímar tey bæði Hall og Jagger hava bilagt hjá sálarfrøðinginum, sigur søgan einki um.

## Væl vald orð…

Tann, sum ikki hevur skil fyri nøkrum beinleiðis ítøkiligum, tekur sum oftast pennin í hond.

**Hororé de Balzac**

Kettur eru til fyri at læra okkum, at ikki alt her á jørð hevur eina meining.

**Garrison Keillor**

Mitt ynski er at gerast bróðir hvíta mansins - ikki svágur hansara.

**Martin Luther King, jr.**

## Ferd'nand




## Veðrið

**Veðurlagið:**

Eitt hátrýst yvir Skandinavia fer sum fráliður eystureftir. Eitt lágtrýst yvir Danmarkarsundinum dýpist og fer so líðandi móti havleiðunum sunnan fyri Ísland.

**Veðurvánirnar fyri Føroyar:**




**Mikudagin og hósdagin:**
Gul ella frískur vindur av suðri, 5-10 m/s. Hálvskýggjað ella skýggjað og viðhvørt tám, men annars turt. Friggjanáttina trilkar hann vindin upp í stívan strúk ella hvassan vind, 13-14 m/s. Lýtt, millum 8 og 13 stig.




**Fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í strúk í vindi av landsynningi, 8-13 m/s. Seinnapartin minni vindur. Samdrigið og regn. Hitin 5-8 stig.

**Leygardagin og sunnudagin:**
Gul av útsynningi, 5 m/s. Gluggaluft og ælaveður, kanska kagar sólin eisini fram. Sum fráliður samdrigið og regn. Hann snarar í sunnan og trilkar vindin; andøvsgul ella strúkur í vindi, 8-13 m/s. Hitin 7-12 stig.

Veðurtíðindi: Danmarks Meteorologiske Institut

## Vestfalskyrrindi

| | | 19.5. | 20.5. | 21.5. |
|---|---|---|---|---|
| Suðuroyar- og Vágafjørður | f.p. | 1054 | 1148 | 0015 |
| | s.p | 2322 | - | 1239 |
| Nólsoyarfjørður | f.p. | 0909 | 1003 | 1054 |
| | s.p. | 2137 | 2230 | 2319 |
| Kalsoyar- og Svínoyarfjørður | f.p. | - | 0037 | 0130 |
| | s.p. | 1209 | 1303 | 1354 |
| Fugloyarfjørður | f.p. | 1154 | 0022 | 0115 |
| | s.p. | - | 1248 | 1339 |
| Vestmannasund | f.p. | 0026 | 0122 | 0215 |
| | s.p. | 1254 | 1348 | 1439 |
| Leirvíksfjørður | f.p. | 1109 | - | 0030 |
| | s.p. | 2337 | 1203 | 1254 |
| Skúvoyar- og Skopunarfjørður | f.p. | 0954 | 1048 | 1139 |
| | s.p. | 2222 | 2315 | - |
| Hestfjørður og Sundini | f.p. | 1009 | 1103 | 1154 |
| | s.p. | 2237 | 2330 | - |
| Mykinesfjørður | f.p. | 0126 | 0222 | 0315 |
| | s.p. | 1354 | 1448 | 1539 |
| 2 fj. í lands. úr Mjóvanesi | f.p. | 0809 | 0903 | 0954 |
| | s.p. | 2037 | 2130 | 2219 |

Harðasti streymur eftir streymkurv: 18. mai
Besti streymur eftir streymkurv: 26. mai
Harðasti streymur eftir streymkurv: 2. juni

## Miðalhiti og úrgangur

Miðal hiti og úrgangur, mált í Tórshavn, hevur hesar seinastu dagarnar verið hesin:

| | | Miðalhiti | Úrgangur í mm |
|---|---|---|---|
| Týsdag | 11.5. | 6.8 | < 0,1 |
| Mikudag | 12.5. | 6.0 | 0 |
| Hósdag | 13.5. | 6.2 | 0 |
| Fríggjadag | 14.5. | 6.5 | 0.1 |
| Leygardag | 15.5. | 4.3 | 0 |
| Sunnudag | 16.5. | 7.1 | < 0,1 |
| Mánadag | 17.5. | 9.0 | 0 |

Kelda: Danmarks Meteorologiske Institut

## Hini gjaldoyruni

**18. mai 1999**

| | | |
|---|---|---|
| New York | USD | 696.1500 |
| London | GBP | 1128.0500 |
| Frankfurt | DEM | 380.4900 |
| Stockholm | SEK | 82.6400 |
| Oslo | NOK | 90.6800 |
| Paris | FRF | 113.4500 |
| Bruxelles | BFR | 18.4480 |
| Zürich | CHF | 464.3500 |
| Amsterdam | NLG | 337.6900 |
| Roma | ITL | 0.3843 |
| Helsinki | FIM | 125.1600 |
| Reykjavík | ISK | 9.6800 |
| Wien | ATS | 54.0840 |
| Madrid | ESP | 4.4730 |
| Lissabon | PTE | 3.7120 |
| Montreal | CAD | 476.9700 |
| Athen | GDR | 2.3150 |
| Tokyo | JPY | 5.6718 |
| Evra | EUR | 744.1400 |
| Dublin | IEP | 944.8600 |

Kelda: Føroya Banki